## Stungin niður við hurðina

Ein 30 ára gomul kvinna varð í nátt stungin niður beint við hurðina hjá sær sjálvari í Rødovre. Eitt vitni greiðir frá at tveir menn stóðu og bíðaðu til kvinnan kom heim. Tá kvinnan gekk framvið monnunum kom rok í, og kvinnan lá eftir, við einum sári á rygginum og einum í økslini. Kvinnan er í løtuni á sjúkrahúsið, og sum skilst er hon ikki í lívsvanda. Talan var helst um ungar menn, í aldrinum 18-20 ár. Løgreglan í Danmark leitar í løtuni eftir teimum.

## Kvinna stakk sambúgva

Ein munnlig orrusta í Esbjerg endaði seint í gjár við, at ein 59 ára gamal maður varð stundin niður av kvinnuni, hann býr saman við. Fleiri ferðir rendi kvinnan knívin inn í mannin, og endin varð, at bløðandi maðurin varð lagdur inn á sjúkrahúsið, har hann varð undir skurði alla náttina. Tað er líkt til at parið var farið at skeldast í einum gildi í íbúð teirra. Tað eydnaðist 41 ára gomlu kvinnuni at stinga mannin fleiri ferðir í bringuna og síðuna, áðrenn hon kom niður á jørðina. Eftir at hava stungið mannin rann hon oman til onkran í hæddini niðriundir, og bað viðkomandi ringja eftir eini ambulansu.

# Ongin grind í eitt ár



*Tað er bert komi fyri átta ferðir, at eingin grind hevur verið í eitt heilt ár*

**Onki grindadráp hevur verið síðan 22. august í fjør. Hetta er óvanliga leingi, men á ongan hátt ógjørligt. Helst er orsøkin til, at ongin grind hevur verið, lági temperaturin í havinum kring oyggjarnar og harvið vantandi høggu-slokkur**

GRINDADRÁP
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Tað byrjar at síggjast í kaggum og frystiboksum, at ongin grind hevur verið í longri tíð, men at ongin grind hevur lagt beinini síðan 22. august í fjør, kemur helst óvart á tey flestu. Seinasta grindin var í Tjørnuvík, meðan Regatta-sigling var í Sundalagnum.

Tað er eisini bara komið fyri sjey ferðir fyrr síðan 1709, at fyrsta grindin á árinum er komin eftir 1. oktobur. Eisini er tað soleiðis, at bara átta ár hava verið síðani 1709, har ongin grind hevur lagt beinini í Føroyum, so talan er veruliga um eina óvanliga støðu.

Tað vil við øðrum orðum hagtalsliga siga, at støðan í ár bara er komin fyri 15 ferðir í tey næstan 300 árini, vit hava hagtøl fyri grindadráp.

### Grindir koma í aldum

Sambært kanning hjá Dorete Bloch, stjóra á Náttúrugripasavninum, kann grind koma fyri allar mánaðirnar í árinum, men vanligast er, at grindirnar verða dripnar um summarið. Har kann veðrið eisini spæla inn, tí grind verður oftast funnin í góðveðrið.

Men mann hevur eisini sæð, at grindir koma í aldum, har kambarnir eru umleið hvørji 100-110 ár og ein dalur er umleið hvørji 50 ár aftaná. Seinasti veruligi kamburin var í 1940'unum, og tí kundi hugsast, at vit eru á veg inn í ein aldudal nú, og næsti kamburin skuldi so komið um eini 50 ár.

Eitt, ið kundi líkst einum kambi var í 1980'unum, men hann er torførur at greiða frá.

- Tað vanliga er, at nógv grind er mitt í øldunum, og minni grind um aldarskiftini. Hvat hendi í 80'unum veit eg ikki, greiðir Dorete Bloch frá.

### Ongin høgguslokkur

Sum skilst er ongin høgguslokkur í økinum kring Føroyar, og tað er høvuðsorsøkin til fáu grindirnar seinastu árini.

- Ongin høgguslokkur hevur verið í føroyskum økið síðani í 80'unum, og tað er yndisføðin hjá grind. Hinvegin roknar mann við, at grindin hevur livað av svartkjafti seinastu árini, og nú er spurningurin, hvat grindin hevur at veiða. Tað er í hvussu so er heilt víst, at grind ikki kemur til Føroyar fyri stuttleikar, og hon ávirkast ikki sjálv nakað serligt av kulda og hita, fortelur Hjálmar Hátún, havfrøðingur, sum saman við øðrum metir, at onkur sambond eru ímillum grindaveiðu og havtemperaturin.

- Soleiðis sum eg havi sæð tað, er neyvt samband ímillum dripnar grindir og temperaturin í økinum rundanum okkum. Tað hevur víst seg, at heitari tað er í havinum kring okkum, oftari leggur grind beinini í Føroyum. Hinvegin er torført at fáa seinastu árini at passa inn í skipanina, men tað hevur helst okkurt at gera við, at høgguslokkurin ikki er komin fyri seg aftur síðani í 80'unum.




*Ársbýtið í miðal av dripnum hvalum. 1.874 grindir við til samans 256.912 grindahvalum í tíðarskeiðinum 1584-2007*

*Kelda: Dorete Bloch*




*Fyrsta grind á árinum kemur ikki altíð í januar. Myndin vísir fyrstu grind á árinum, sum ikki er komin fyrr enn ymsar aðrar mánaðir í tíðarskeiðinum 1709-2007*

*Kelda: Dorete Bloch*

## Munur millum oyggjarnar

GRINDADRÁP
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Í samband við grindadráp kann Føroyar býtast í tvey, eina norðara/eystara part og ein syðra/vestara part. Vágirnar við mest grind eru Miðvágur og Klaksvík, sum sambært hagtølunum hjá Dorete Bloch eru vágirnar, har umleið ein triðingur av øllum grindum, ið hava lagt beinini í Føroyum eru dripnar.

Sambært Hjálmar Hátún er líkt til, at stórur munur á, hvørjar grindir koma inn í eystara partin og vestara partin.

- Tað hevur víst seg líka aftur til 1709, at neyvt samband er millum temperaturin í havinum kring okkum og talið av grindum í eystara partinum á landinum. Tað er ofta talan um eina migratión hjá grindini, har hvalirnir koma norðanífrá og koma beint fram við eystara partinum á Føroyum. Hetta ger seg galdandi tá temperaturin er høgur í havinum, greiðir Hjálmar Hátún frá.

Síðan í 80'unum hevur sambandið millum havtemperatur og grind verið heldur kámari, tí høgguslokkurin er ikki komin fyri seg aftur síðani í 80'unum, tá bæði svartkjaftur og høgguslokkur blivu burtur.

- Í 90'unum kom svartkjafturin fyri seg aftur, men tað gjørdi høgguslokkurin ikki. Tá er nærliggjandi at hugsa, at mennskja hevur havt onkra ávirkan, fortelur Hjálmar Hátún.

- Hinvegin er ikki tílíkt samband í vestara partinum, men heldur er tað tilvild, at hvalir sunnanfyri koma inn á vestara ella syðra part av landinum, heldur Hjálmar Hátún.